januar

LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

# Frælsur Ítróttur Føroya

**Hoydalsvegur 23, FO-110 Tórshavn**

## Ársfrásøgn

## 2018

**FRUMRIT**

# Innihaldsyvirlit


| | Síða |
|---|---|
| **Átekningar** | |
| Leiðsluátekning | 1 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 2 |
| **Upplýsingar um felagið** | |
| Upplýsingar um felagið | 5 |
| **Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2018** | |
| Nýttur roknskaparháttur | 6 |
| Rakstrarroknskapur | 8 |
| Fíggjarstøða | 9 |
| Notur | 11 |

## Leiðsluátekning

Nevndin hevur í dag lagt fram ársfrásøgnina fyri 2018 hjá Frælsur Ítróttur Føroya.

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2018 og av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2018.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, tann 1. mai 2019

**Stjórn**

Sølvi Reinert Hansen
formaður

**Nevnd**

| | | |
|---|---|---|
| Sølvi Reinert Hansen<br>formaður | Niels Jákup Jakobsen<br>næstformaður | Guttorm Sørensen<br>kassameistari |
| Rigmor Napoleonsdóttir Arge | Regin Thomsen | |

## Átekning frá óheftum grannskoðara

**Til í Frælsur Ítróttur Føroya**

**Niðurstøða**

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Frælsur Ítróttur Føroya fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2018 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2018 og av úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2018 samsvarandi ársroknskaparlógini.

**Grundarlag fyri niðurstøðuni**

Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin". Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða etisku krøvunum fyri grannskoðarar (etisku reglunum hjá IESBA) og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, og vit hava hildið okkara etisku skyldur, sum ásettar eru í hesum standardum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Áherðslur á viðurskifti í roknskapinum**

Felagið hevur ikki roknað meirvirðisgjald av sponsorvirksemi. Hetta er í stríð við meirvirðisgjaldlógina. Leiðslan kann ábyrgdast fyri hesum.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ársroknskap í samsvari við roknskaparháttin, sum greitt er frá um í brotinum um nýttan roknskaparhátt. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til, fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ársroknskapurin verður gjørdur hevur leiðslan ábyrgdina av at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er viðkomandi; umframt at gera ársroknskapin eftir roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka felagið, steðga rakstrinum, ella at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika enn at gera tað.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

**Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin**

Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja, umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar.

- Gera niðurstøðu um, hvørt tað er hóskandi, at leiðslan hevur gjørt ársroknskapin við støði í roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, umframt um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa um hendingar og viðurskifti, sum kunnu viðføra týðandi iva, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit í okkara grannskoðanarátekning vísa á upplýsingar um hesi viðurskifti í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið framtil dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar og viðurskifti í framtíðini kunnu tó føra við sær, at felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.

- Meta um samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, herundir upplýsingarnar í notunum, umframt um ársroknskapurin vísir tey undirliggjandi handilsviðurskifti og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd av hesum.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eygleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit eyðmerkja undir grannskoðanini.

Tórshavn, tann 1. mai 2019

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

Jógvan Amonsson
statsaut. revisor

## Upplýsingar um felagið

| | | |
|---|---|---|
| **Felagið** | Frælsur Ítróttur Føroya<br>Hoydalsvegur 23<br>FO-110 Tórshavn | |
| | Heimasíða: | www.fif.fo |
| | V-tal: | 525626 |
| | Roknskaparár: | 1. januar - 31. desember |
| **Nevnd** | Sølvi Reinert Hansen, formaður<br>Niels Jákup Jakobsen, næstformaður<br>Guttorm Sørensen, kassameistari<br>Rigmor Napoleonsdóttir Arge<br>Regin Thomsen | |
| **Stjórn** | Sølvi Reinert Hansen, formaður | |
| **Grannskoðan** | **P/F Januar, løggilt grannskoðanarvirki**<br>Óðinshædd 13, Postbox 30, FO-110 Tórshavn<br>Telefon: 31 47 00 - Telefaks: 35 17 01<br>Teldupostur: januar@januar.fo<br>Heimasíða: www.januar.fo | |

## Nýttur roknskaparháttur

Innanhýsis ársfrásøgnin fyri Frælsur Ítróttur Føroya er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri feløg í flokki A.

Ársfrásøgnin er gjørd eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár og verður gjørd í donskum krónum (DKK).

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl, og samanberingartøl undanfarna ár verða avrundað til heil túsund. Av tí, at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

**Alment um innrokning og virðisáseting**

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva felagnum fíggjarligar fyrimunir, og virðið av ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr felagnum, og virðið av skylduni kann ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til útveganarvirði. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum greitt er frá niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn innanhýsis ársfrásøgnin er liðug, og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

## Rakstrarroknskapurin

**Inntøkur**

Inntøkan er stuðul og luttøkugjøld. Inntøkan er veitt felagnum innan árslok. Stuðul og aðrar sáttmálatengdar inntøkur verða tiknar við og tíðargreinaðar, samsvarandi sáttmálainnihaldinum.

**Kostnaður**

Rakstrarkostnaður fevnir um allan kostnað, sum knýtir seg til høvuðsraksturin hjá sambandinum.

**Fíggjarpostar**

Fíggjarligir postar umfata rentuinntøkur og -kostnaðir. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

## Nýttur roknskaparháttur

## Fíggjarstøðan

### Áogn

Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Fyri at standa ímóti møguligum tapi verður niðurskrivað til nettorealisatiónsvirðið.

### Tøkur peningur

Tøkur peningur umfatar innistandandi í peningastovnum og reiðan pening.

### Skuld

Onnur skuld verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virðið.

### Tíðaravmarkingar

Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir skuld, umfata inngjøld, sum viðvíkja inntøkum komandi árini.

# Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember

| Nota | | 2018 kr. | 2017 t.kr. |
|---|---|---|---|
| 1 | Inntøkur | 693.455 | 686 |
| 2 | Landsliðskostnaðir | -221.428 | -372 |
| 3 | Ungdómslandsliðskostnaðir | 0 | -164 |
| 4 | Úrvalskostnaðir | -6.923 | 0 |
| 5 | Kappingarútreiðslur | -120.981 | -31 |
| 6 | Venjaraskeið | -50.835 | -10 |
| 7 | Altjóða fundir | -11.176 | -14 |
| 8 | Felagskostnaður | -95.932 | -79 |
| 9 | Høliskostnaður | 0 | -1 |
| 10 | Fyrisitingarkostnaður | -23.805 | -19 |
| | **Rakstrarúrslit** | **162.375** | **-4** |
| | Aðrar fíggjarligar inntøkur | 194 | 0 |
| | **Ársúrslit** | **162.569** | **-4** |

**Uppskot til býti av úrsliti:**

| | 2018 kr. | 2017 t.kr. |
|---|---|---|
| Flytast til flutt úrslit | 162.569 | 0 |
| Flutt frá fluttum úrsliti | 0 | -4 |
| **Býtt tilsamans** | **162.569** | **-4** |

## Fíggjarstøða 31. desember

### OGN

| Nota | | 2018 kr. | 2017 t.kr. |
|---|---|---|---|
| | **Støðisogn** | | |
| 11 | Tíðtøkutól | 0 | 0 |
| | Materiell støðisogn tilsamans | 0 | 0 |
| | **Støðisogn tilsamans** | **0** | **0** |
| | **Ogn í umferð** | | |
| | Vøru- og tænastuáogn | 129.900 | 100 |
| | Lagt út fyri úrval | 0 | 133 |
| | Áogn tilsamans | 129.900 | 233 |
| | Konta fyri Úrvalspening | 166.929 | 255 |
| | Innogn í peningastovni | 803.447 | 595 |
| | Tøkur peningur | 970.376 | 850 |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **1.100.276** | **1.083** |
| | **OGN TILSAMANS** | **1.100.276** | **1.083** |

## Fíggjarstøða 31. desember

### Passiver

| Note | | 2018<br>kr. | 2017<br>t.kr. |
|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | |
| 12 | Flutt úrslit | 756.429 | 594 |
| | **Eginogn tilsamans** | **756.429** | **594** |
| | | | |
| | **Avsettar skyldur** | | |
| | Avsett til Hagtalsgrunnin | 123.299 | 123 |
| | **Avsettar skyldur tilsamans** | **123.299** | **123** |
| | | | |
| | **Skuld** | | |
| | Vøru- og tænastuskuld | 3.619 | 36 |
| | Óbrúktur Úrvalsstuðul | 166.929 | 255 |
| | Tíðaravmarkingar | 50.000 | 75 |
| | Stuttfreistað skuld tilsamans | 220.548 | 366 |
| | **Skuld tilsamans** | **220.548** | **366** |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **1.100.276** | **1.083** |

# Notur

| | | 2018<br>kr. | 2017<br>t.kr. |
|---|---|---|---|
| **1.** | **Inntøkur** | | |
| | Landskassastuðul/ÍSF | 588.455 | 605 |
| | Høvuðstuðul | 50.000 | 50 |
| | Luttøkugjøld | 0 | 18 |
| | Aðrar inntøkur | 55.000 | 13 |
| | | **693.455** | **686** |
| **2.** | **Landsliðskostnaðir** | | |
| | Ferðakostnaður í Føroyum | 5.894 | 8 |
| | Uppihald í Føroyum | 0 | 7 |
| | Kostur í Føroyum | 0 | 13 |
| | Ferðakostanður til og í útlandinum | 106.361 | 73 |
| | Uppihald í útlandinum | 100.159 | 102 |
| | Kostur í útlandinum | 2.870 | 16 |
| | Búnar o.l. | 0 | 149 |
| | Leigan av vøllum/hølum | 0 | 2 |
| | Annað | 6.144 | 2 |
| | | **221.428** | **372** |
| **3.** | **Ungdómslandsliðskostnaðir** | | |
| | Ferðakostnaður í Føroyum | 0 | 7 |
| | Uppihald í Føroyum | 0 | 11 |
| | Kostur í Føroyum | 0 | 9 |
| | Ferðakostnaður í útlandinum | 0 | 76 |
| | Uppihald í útlandinum | 0 | 43 |
| | Kostur í útlandinum | 0 | 5 |
| | Leigan av vøllum/hølum | 0 | 8 |
| | Annað | 0 | 5 |
| | | **0** | **164** |

| | | 2018<br>kr. | 2017<br>t.kr. |
|---|---|---|---|
| **4.** | **Úrvalskostnaðir** | | |
| | Ferðakostnaðir til og í útland | 4.360 | 0 |
| | Uppihald útland | 1.195 | 0 |
| | Kostur útland | 1.018 | 0 |
| | Annað | 350 | 0 |
| | | **6.923** | **0** |
| **5.** | **Kappingarútreiðslur** | | |
| | Uppihald | 0 | 2 |
| | Heiðusmerkir, steyp o.l. | 86.614 | 15 |
| | Annað | 34.367 | 14 |
| | | **120.981** | **31** |
| **6.** | **Venjaraskeið** | | |
| | Ferðakostnaður | 14.437 | 0 |
| | Tilfar | 0 | 1 |
| | Løn/samsýning/kostur skeiðshaldari | 25.233 | 0 |
| | Leiga av høli | 1.875 | 0 |
| | Annað | 9.290 | 9 |
| | | **50.835** | **10** |
| **7.** | **Altjóða fundir** | | |
| | Ferðakostnaður | 9.476 | 9 |
| | Uppihald | 1.700 | 5 |
| | | **11.176** | **14** |

| | 2018<br>kr. | 2017<br>t.kr. |
|---|---|---|

**8. Felagskostnaður**

| | 2018 kr. | 2017 t.kr. |
|---|---|---|
| Ferðakostnaður | 5.512 | 8 |
| Útgerð | 48.583 | 3 |
| Fundarkostnaður | 1.805 | 3 |
| Umboðan | 20.509 | 35 |
| Starvsnevndarfundir | 637 | 0 |
| Limagjøld | 0 | 12 |
| Klæðir og búnar | 0 | 7 |
| Tilmeldingarskipan | 18.000 | 11 |
| Annað | 886 | 0 |
| | **95.932** | **79** |

**9. Høliskostnaður**

| | 2018 kr. | 2017 t.kr. |
|---|---|---|
| Viðlíkahald | 0 | 1 |
| | **0** | **1** |

**10. Fyrisitingarkostnaður**

| | 2018 kr. | 2017 t.kr. |
|---|---|---|
| Telefon, fax og internet | 1.598 | 0 |
| Bókhald | 4.494 | 6 |
| Grannskoðan | 13.543 | 12 |
| Flytingarprov. | 1.945 | 0 |
| Annað | 2.225 | 1 |
| | **23.805** | **19** |

## 11. Materiell støðisogn

| | Tíðtøkutól kr. |
|---|---|
| Útveganarvirði 1. januar | 103.570 |
| **Útveganarvirði 31. desember** | **103.570** |
| Av- og niðurskrivingar 1. januar | 103.570 |
| **Av- og niðurskrivingar 31. desember** | **103.570** |
| **Roknskaparligt virði 31. desember** | **0** |

| | 31/12 2018 kr. | 31/12 2017 t.kr. |
|---|---|---|
| **12. Flutt úrslit** | | |
| Flutt úrslit 1. januar | 593.860 | 598 |
| Fluttur vinningur ella hall í árinum | 162.569 | -4 |
| | **756.429** | **594** |